# Jólakalendarin 2006

## Tá trøllini vildu hava post



Trøllapætur hevði allan dagin sitið og teknað og skrivað jólakort. Og nú sat hann og hugsaði um øll tey fittu og góðu børnini, sum hann hevði hitt runt um í Føroyum. Um hann skuldi sent tekningar og postkort til øll børnini, sum hann og omman høvdu heilsað uppá til konsertir og í føðingardøgum, ja so hevði hann verið noyddur at sitið á halanum allan veturin við blýanti og pappíri. Og tað hevði Trøllapætur ikki orkað og tímað. Nei, nú manglaði bert at gera tekningina til Ossa lidna. Trøllaspælibeiggin búði í Frankaríki, so brævið skuldi sendast í góðari tíð, um Ossi skuldi hava tað áðrenn jól.

Omman lá á beininum og snorkaði. Hann hevði stákast og rokast allan dagin. Tað er so nógv at gera uppundir jól. Og omman er jú ikki heilt ung longur.

– Omma, ooommmaaa vakna nú!! Trøllapætur ruskaði í ommuna.

– Eg eri liðugur at skriva postkort. Kom....

Trøllaomman sprakk úr svøvni sum ein leysur fjøður. Hon leyp yvir til jólakalendaran og stillaði seg aftan fyri Trøllapætur, sum longu hevði funnið lúkuna við fýratalinum.

– Hygg hvør er á myndini, omma! Ein maður við stórari tasku...

– Á, góðasti. Nú dugir omma ikki ats iga hvør tað er. Men eg síggi at hatta er ein postmaður. Og teir kenna væl trøllini og trøllini kenna væl teir.

Trøllapætur hugdi spyrjandi uppá ommuna, sum bíðaði hann bert at trøllaomman skuldi siga okkurt afturat..

"Ja, trøll og postmenn hava síðani pakkar og brøv vóru uppfunnin vitað av hvørjum øðrum. Visti tú Trøllapætur, at í gomlum døgum gingu postmenn javnan uppum fjøll við brøvum, pakkum og bløðum? Men altíð vóru tað fólkini í smáu bygdunumi, sum fingu pakka frá postmonnunum og ongantíð var nakað spennandi til trøllini. Hóast trøll tá í tíðini ikki lósu bløð og brøv, so vóru tey kortini firtin um, at í posttaskuni ongantíð var nakað til teirra. Og veitst hvat hendi so?"

Nei, hvussu kundi Trøllapætur vita tað? Og omman helt helt at siga frá.

"Á trøllatingi við Hellisá blivu trøllini samd um, at okkurt mátti gerast. Og tað sum hendi, varð, at trøllini rullaðu steinar fyri gøturnar, soleiðis at onki menniskja slapp framvið uttan at skulu langar og truplar umvegir. Rættuliga skjótt fataðu postboðini, at tað vóru trøllini, sum í nógv ár hava rátt í fjøllunum, sum gjørdu teimum ónáðir. Aftaná tann dagin byrjaðu postboðini at bera trøllunum pakkar og tinganest. Og síðani tá hava trøllini og postboðini verið vinir ..."

Trøllaomman sá hvussu øll oyruni á Trøllapæturi lurtaði.

"Í dag er alt so nógv øðrvísi. Nú ganga postboðini ikki longur millum bygdirnar og fólkini skriva ikki so nógv brøv og jólakort longur. Og jólapakkarnir eru so stórir og tungir at teir mugu koyrast við bilum...."

Trøllapætur var um at linka. Meðan omman murraði og fortaldi, sá hann fyri sær eitt stórt pakkafjall av vøkrum gávum við nærum øllum, sum ein kann ynsktja sær. Bleytir pakkar og harðir pakkar. Pakkar í alskins skapi, fýrakantaðir, tríkantaðir og rundir. Har var alt, sum eitt fitt trøll kundi hugsa sær. Meðan eyguni spakuliga duttu saman pakkaði Trøllapætur út nýggju jólaklæði og ein ein fínan trølladunk við reyðari hársápu.

hevði verið í aðrari verð, leyp brádliga sum ein rakett upp úr stólinum!








Minst til í dag...



Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum í dag

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari